## Kappast at gera sang til Trølla Pætur

Trølllapætur og omman fara skjótt at geva út nýggja trøllafløgu, og tey mangla nakrar nýggjar góðar barnasangir, sum børnini sjálvi kunnu skriva. Trøllini heita tí á øll børn um at lata smáar fittar yrkingar, sum tey sjálv hava gjørt – tí øll børn duga jú at ríma og at yrkja. Hugskotið er, at børnini finna upp á orðini, so skal Trøllaomman gera løg til og fara í studio at spæla inn. Sangirnir kunnu vera um alt millum himmal og jørð. Tann, sum eigur bestu yrkingina, vinnur eina ógloymandi løtu saman við Trøllapæturi og Trøllaommuni. Okkurt annað gott verður eisini at vinna, siga trøllini. Nøvnini á vinnandi børnunum verða at síggja á heimasíðuni hjá trøllinum fríggjadagin 21. august. www.tp.fo



# Sandoyingar og skúvoyingar flýggja úr Javnaðarflokkinum

**Eitt stórt tal av javnaðarfólki í Sandoy og í Skuvoy hava boðað frá, at tey melda seg úr Javnaðarflokkinum, vil flokkurin ikki tryggja teimum, at farið verður undir undirsjóvartunnilin seinast í 2010. Formaðurin í Javnaðarfelagnum í Sandoy er ein av teimum**



*Vil restin av Javnaðarflokkinum ikki stuðla Gerhard Lognberg og tryggja Sandoyingum undirsjóvartunnil, fer tað at forkoma flokkinum í Sandoynni og Skúvoynni. formaður floksins á staðnum er ein av teimum, sum rýmir*

UNDIRSJÓVAR-TUNNILIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Gongur Javnaðarflokkurin við til at útseta undirsjóvartunnilin, verður tað hansara deyði í Sandoynni og í Skúvoynni.

Tað er formaðurin í Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag, William Davidsen, púra sannførdur um.

Javnaðarfelagið hevur viðgjørt málið um Sandoyartunnilin, og niðurstøðan er, at felagið tekur fult undir við tí, sum tingmaðurin í oynni, Gerhard Lognberg, hevur ført fram í hesum máli.

Felagið tekur somuleiðis fult undir við kravinum frá Gerhardi Lognberg um at fáa greitt svar frá løgmanni, um farið verður undir tunnilin seinast í 2010, ella ikki.

Ein slík trygd frá løgmanni er treytin fyri at varðveita Gerhard Lognberg í samgonguni, og tað er sostatt eisini treytin fyri, at samgongan varðveitir meirilutan í løgtinginum, sum støðan er nú.

At røddir so hava verið frammi seinastu dagarnar um at fáa Sjálvstýrisflokkin upp í samgonguna fyri at útplasera teir báðar sandoyartingmenninar, er ein heilt onnur søga.

### Endin á Javnaðarflokkinum

Men vil Javnaðarflokkurin ikki stuðla Gerhardi Lognberg í kravinum um at fáa undirsjóvartunnil nú, sær William Davidsen ógvuliga svart upp á framtíðina hjá flokkinum í Sandoynni einsvæl og í Skúvoy.

Hann ivast ikki í, at tað fer at verða ein ógvuliga dýr søga fyri Javnaðarflokkin í Sandoy og úr Skúvoy. Men sostatt verður tað eisini ein dýr søga fyri Javnaðarflokkin sum heild í øllum landinum, tí hann hevur altíð staðið sterkur í Sandoy og Skúvoy og fingið nógvar atkvøður, sum muna rættiliga væl, tá ið valúrslitið skal gerast upp í øllum landinum.

- Fær Gerhard Lognberg ikki undirtøku frá sínum egna flokki, og vil Javnaðarflokkurin ikki tryggja okkum, at vit fáa undirsjóvartunnilin nú, eri eg fullvísur í, at tað verður endin hjá Javnaðarflokkinum í Sandoy og í Skúvoynni, sigur hann.

Hann ivast ikki í, at tekur Javnaðarflokkurin ikki undir við at vit fáa tunnilin nú, fer tað at verða ein sonn fólkaferð av javnaðarfólki í Sandoynni og í Skúvoynnni, sum fara at flýggja úr Javnaðarflokkinmum.

- Seinastu tíðina hevur eitt stórt tal av limum í Javnaðarfelagnum í Sandoy og Skúvoy ringt til mín og boðað greitt frá, at tekur flokkurin ikki undir við, at vit fáa tunnilin nú, melda tey seg úr flokkinum og venda honum bakið.

William Davidsen ivast ikki í, at hetta fer at kosta Javnaðarflokkinum eitt umboð á løgtingi.

### Formaðurin rýmur

Sjálvur hevur formaðurin í Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag gjørt sína støðu púra greiða.

- Tekur Javnaðarflokkurin ikki undir við, at vit fáa tunnilin nú, fari eg frá sum formaður felagsins, og eg meldi meg somuleiðis úr Javnaðarflokkinum, sigur William Davidsen.

Hann sigur, at hann hevur skilt á nevndarliminum í felagnum, sum umboðar Skúvoy, at bæði hann og skúvoyingar sum heild hava somu støðu, og at teir fara at melda seg úr, fáa teir ikki undirtøku í flokkinum.

- Men tað hava heilt nógvir aðrir limir, bæði yngri og eldri limir, boðað frá somu støðu.

- Vit hava onki fingið í Sandoynni í tvey valskeið, og vit finna okkum ikki í hesum longur, samstundis sum fólkatalið alsamt minkar.

- Verður tunnilin útsettur, stúri eg fyri, at tað fer at seta ferð á eina sanna fólkaflyting úr oynni, leggur William Davidsen afturat.

## Tjóðveldisfólk skifta hest

**Tekur Tjóðveldið ikki undir við at vit fáa undirsjóvartunnilin nú, fer tað at kosta dýrt, er Meiken Krabenhøft sannførd um**

UNDIRSJÓVAR-TUNNILIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vil Tjóðveldið ikki taka undir við, at vit fáa undirsjóvartunnilin í Sandoynna nú, fer tað at vera eitt ógvuliga stórt bakkast fyri hann í Sandoynni og í Skúvoynni.

Meiken Krabenhøft er forkvinna í tjóðveldisfelagnum í Sandoynni, og hon ivast ikki í, at tekur flokkurin ikki undir við, at undirsjóvartunnilin kemur nú, fer tað at kosta honum dýrt í atkvøðum í Sandoynni og í Skúvoynni.

- So ivist eg ikki í, at veljarin heldur fer at royna okkurt annað fyri at vita, um tað hjálpir, sigur hon.

Tjóðveldisfelagið í Sandoy hevur ikki viðgjørt støðuna, men forkvinnan er sannførd um, at fær veljarin ikki tað, hann vil hava við teimum umboðum, hann hevur valt á ting, fer veljarin bara at skifta hest á næsta vali fyri at vita, um ein nýggjur hestur roynist betri.

Hon sigur, at veljarin setir sítt álit á, at undirsjóvartunnilin kemur nú, men verður tað av ongum, ivast hon ikki í, at tjóðveldisveljarar í stórum tali fara at venda sær til aðrar flokkar á næsta løgtingsvali.

Tað er vanliga prátið ímillum fólk, leggur hon afturat.

Sjálv hevur hon ikki gjørt upp við seg sjálva, hvørja støðu, hon fer at taka, vil flokkurin ikki stuðla einum undirsjóvartunli beint nú.